tíðindablaðið sosialurin
7,-
Nr. 245 ★ mikudagur 23. desember 1992

AFTUR Í DAG SETA VIT NÝTT ÚTGÁVUMET – BLAÐ NR. 245

# Schlüter: Tit klára tykkum

Síða 4-5



*Undirgrundin varð yvirtikin klokkan 10:00 í gjáramorgunin, her skála Poul Schluter og Atli Dam yvir yvirtøkuna. Mynd Kalmar*

## *Jólalesnaður:*

## Tá fimm unglingar sjólótust í Svínoy fyri 80 árum síðan og aðrar hendingar

*Síðurnar 18-22*



Øllum okkara lesarum og lýsarum ynskja vit eini gleðilig jól



*Poul Schluter, forsætisráðharri:*

# TIT HAVA ÁBYRGDINA

*Danski forsætisráðharrin kundi á tíðindafundi í Tinganesi í gjár onga trygd veita fyri, at danir fóru at vera eins hjálpsamir, um føroysku bankarnir komu í nýggjar trupuleikar komandi ár. "Det er først og fremmest de færøske myndigheder, der må bære ansvaret for den færøske finanspolitikk, segði hann*

Kunnu føroyingar rokna við hjálp frá dønum um at gongur av skriðuni til í komandi ári. Hetta kundi danski forsætisráðharrin Poul Schluter hvørki svara ja ella nei til. Hann mól uttanum og endaði við at siga, at hann hevði svara spurninginum. Og tað gekk eisini fram at Poul Schlulter ikki roknar við, at nakar banki ella føroyska samfelagið sum heild fer á húsagangí komandi ár. Hann metti hendan spurningin at vera hypotetiskan.

–Talan hevur verið um stóran miss í føroyska samfelagnum og vit hava verið við til at hjálpt í ár. Leggjast skal afturat, at vit bjargaðu Sjóvinnubankanum við eini garantiskipan. Í løtuni fara saneringar fram í føroyska samfelagnum. Men tað er fyrst og fremst teir føroysku myndugleikarnir sum hava ábyrgdina av føroysku fíggjarstøðuni.

–Vit mugu vóna, at føroyski búskapurin kemur á føtur aftur og at tann føroyski búskapurin gerst sunnur aftur, sigur Poul Schluter, forsætisráðharri.

### Høgan livifót

Sosialurin: *Hr. Statsminister. Færøerne har været meget omtalt i danske medier i den seneste tid. Der har blandt andet været ført frem, at mens dele av borgerne i Syddanmark lever under yderst kummerlige forhold, pumper danskerne penge til overforbrug på Færøerne. Har du indtryk af, at de danske skattepenge går til overforbrug?*

–Færøerne har en høj levestandard og færingerne har havt gode indkomster i en lang periode. Nu oplever vi både resourcefald og prisfald, segði Poul Schluter.

Og gongur alt at skrið--uni til komandi ár, so kunnu vit ikki rokna við, at danir fara at seta blokkstuðulin upp.

–Føroyingar standa yvirfyri eini akuttari støðu. Vit mugu vóna at føroyingar klára at loysa trupuleikarnar. Vit kunnu altíð tosa um grundarlagið fyri blokkstuðlinum, men fyri komandi ár er hann fastsettur, so har verða neyvan broytingar, segði Poul Schluter, forsætisráðharri.

júslinus



## Blandi meg ikki

Nógvar gitingar hava verið um ørindi Schluters bert hava verið at undirskriva avtaluna um undirgrundina. Hann varð spurdur um nakað var í tíðindunum um, at hann var komin til Føroya at biðja Atla Dam um at verða sitandi sum løgmaður. Hesum avvísti Poul Schluter uppá tað harðasta. Atli Dam tók hetta sum eitt kompliment.

júslinus

# So eiga vit okkara egnu undirgrund

*–Føroyingar hava skyldu til at bjóða donskum fyritøkum fyrst arbeiði at leita eftir olju, bora og annað íð stendst av oljuvinnu, men bert um hesar eru kappingarførar við aðrar í prísi, sigur Poul Schluter, forsætisráðharri*

Týsmorgunin var ein søguligur morgun í Føroyum. Ikki síðan teir fyrstu landnámsmennirnir settu búgv í Føroyum hava vit átt undirgrundina, sum okkara kæru oyggjar standa á. Men nú hava vit tað svart uppá hvítt. Undirgrundin er okkara og tað gjørdist hon klokkan 10:00 týsmorgunin 22. desember, tá Poul Schluter og Atli Dam undirskrivað-u avtaluna, sum sigur, at føroyingar hava yvirtikið undirgrundina sum sermál.

Tað hevur verið samráðst um hetta mál í mong ár, og nú Atli Dam, leggur frá sær er tað ikki uttan sørt av stoltleika, tí hann hevur umsitið sjórnarskipanarmál í mong mong ár og hevur verið við í hesum samráðingum alla tíðina. Og hetta er krúnan á verkið.

–Jeg tror begge parter var modne til denne overdragelse nu, segði Poul Schuter, forsætisráðharri á tíðindafundinum týsmorgunin.

–Vit skuldu til at samráðast av nýggjum um undirgrundina, og eg haldi at tað vit eru komnir fram til nú er tað rætta. Finnast ráevni í undirgrundini, hvat eg vóni, og føroyingar fáa vinning av hesum, so fara vit at umhugsa grundarlagið undir blokkstuðlinum, tað er ein treyt, segði hann.

–Eg haldi, at tað eisini er av týdningi, at føroyingar sjálvir bera allan kostn-aðin av møguligari oljuleiting í Føroyum.

Maersk hevur stovnað eitt felag í Danmark, sum eitur Faroe Drilling. Poul Schluter varð spurdur um hetta hevði nakað við yvirtøkuna av undirgrundini at gera.

–Tað veit eg ikki, um so er, so er tað gott. Danskar fyrotøkur eiga frammihjárætt at arbeiða í eini komandi føroyskari oljuvinnu, men bert um tær eru kappingarførar í prísi, segði Poul Schluter.

–At til nú hava yvirtikið ráevnini í undirgrundini hevur við sær, at nú kann byrjast at løggeva fyri oljuvinnu í Føroyum, segði hann.

**jústinus**



*Poul Schluter og Atli Dam á tíðindafundi.*

# Sundstein er heima

Jógvan Sundstein er ikki farin til Danmark í jólafrí í seinastu viku. Tað prógvar myndin Kalmar tók mánadagin á Boðanesi, tá Jógvan og Atli vóru og tóku ímóti Poul Schluter. Vit hava tí gjørt honum órætt í teiginum "Vikan ið fór" týsdagin.

**jústinus**





*Poul Schluter, forsætisráðharri:*

# Tit klára tykkum

*–Eg bæði trúgvi og vóni at føroyingar kunnu klára seg, um teir rívа seg leysar frá Danmark, men tað verður torført, segði Poul Schluter á tíðindafundi í Tinganesi fríggjamorgunin.*

Fyrrapartin fríggjadagin hildu Poul Schluter, forsætisráðharri og Atli P. Dam løgmaður tíðindafund í nýggju hølunum í Sjó -og Vektarbúðini í Tinganesi. Og hesin tíðindafundur varð hildin í samband við at Atli P. Dam og Poul Schluter undirskrivaðu avtaluna, har føroyingar yvirtaka undirgrundina sum sermál

Poul Schluter bæði trýr og vónar, at føroyingar fara at klára seg sum sjálvstøðug tjóð.

Sosialurin: *Den brede danske holdning til om Færøerne skal være sammen med Danmark eller ej har været, at hvis færingerne selv ønsker løsrivelse, så skal de få den. Tror du helt ærligt, personligt, at Færøerne kann klare sig helt alene og uden hjælp fra Danmark, som en selvstændig nation?*

–Jeg tror, at Færøerne har glæde af rigsfællesskabet. Der er stærke bånd imellem os. Danskerne har også glæde af rigsfællesskabet. F. eks. så eksporterer vi mange varer til Færøerne. Vi kan ikke se bort fra, at det betyder noget, segði Poul Schluter, forsætisráðharri.

Poul Schluter legði afturat: "Um vit vilja halda fram í ríkisfelagsskapi tey næstu 100 árini, tað skulu vera tveir partar um at avgerða, bæði danir og føroyingar. Ríkisfelagsskapurin má hvíla á ynskjunum bæði hjá føroyingum og dønum."

–Men gerast tit sjálvstøðugir, so bæði trúgvi og vóni eg at tit fara at klára tað, men tað verður torført, segði Poul Schluter, forsætisráðharri.

**jústinus**